Hóast fólk eru sálarliga sjúk á ungum árum, nýtast tey ikki at uppihalda sær á stovni, allar lividagar. Hjá summum linkar sjúkan, og tá er umráðandi at fáa slíkum persónum innivist millum hini í samfelagnum.
Myndin er tillagað
Mynd: Kalmar

Lýst verður eftir familju

- sum vit veita fólki innivist, ið áður hava havt sálarligar sjúkur

Tað er ikki á hvørjum degi, at Landssjúkrahúsið sóknast eftir familju, ið hava hug at hýsa og fjálga um fyrrverandi sálarsjúklingar, sum eru vorðnir so sjálvbjargnir, at teir ikki longur nýtast at uppihalda sær á stovni.

Slík lýsing var at síggja í vikuni, og tað er Magnus Isaksen, sosialráðgevi, sum áhugaði kunnu venda sær til.

Er tað vanligt, at tit soleiðis heita á fólk um hjálp?

- Tað hevur onkuntíð verið roynt áður, men annars er tað oftast barnaverndir og aðrir hjálparfelagsskapir, sum royna hesa loysn, sigur Magnus Isaksen og skoytir uppí:

SJÚKAN LINKAR

- Tað er ofta soleiðis, at fólk frá tey eru og til tey koma upp í 20' og 30' árini, kunnu hava sálarligar sjúkur, og tí noyðast at verða á psykiatrisku deild.

Sum frálíður og tey gerast eldri, linkar sjúkan. Tí er ikki neyðugt hjá teimum at vera á stovni longur. Tey hava nógv betur av at sleppa út millum fólk at virka.

- Slíkir sjúklingar hava kanska ikki altíð umstøður at fara heim aftur, grundað á broytt familju viðurskifti heima.

- Vit hava roynt at leiga sjúklingum eitt høli í býnum, men tað hevur ikki verið nøkur góð loysn. Hóast teir eru væl fyri og kunnu gera eitthvørt arbeiði, so fella teir í fátt, um teir brádliga skulu búgva einsamøll, eftir at teir kanska hava búð á stovni í bæði 10 og 15 ár.

- Tað at vit royna at fáa familjur at geva slíkum fólkum innivist, er eisini fyri at veita teimum eitt sosialt trygdarnet, sum kann vera um henda persónin, eins og eina familja.

Vit royna eisini at fáa persónum arbeiði, og um tað eydnast at fáa innivist eisini, eru útlitini góð, at tey kunnu trívast úti í samfelagnum.

Best hevði tó verið, um vit høvdu skipað verkstaðir, har fólk kundu fingið undirvísing og prógv fyri, at tey dugdu eitthvørt til arbeiðis.

Aðrastaðni hava tey nakað, ið verður nevnt arbeiðsroyndir í ymiskum fakum, har eitt prógv kann vísa á, hvat viðkomandi kann gera.

Psykiatriska deild hevur bústaðarhúsið Sólteig í Havn og Vistarheim við Toftavatn til at taka.

- Um fólk skulu royna at fóta sær eftir so langa tíð á sjúkradeild, hóast tað ikki beinleiðis er neyðugt, noyðast tey at fáa ein rímiligan kjans til aftur at virka í samfelagnum, sigur Magnus Isaksen, sosialráðgevi á Landssjúkrahúsinum.

Tað er Almannastovan sum rindar fyri familjupleygu av slíkum slag.

Tey, sum veita persónum innivst fáa umleið 4000 krónur um mánaðan, harav 2000 krónur eru skattafrían.

Dagny

Meira lán

Tórshavnar býráð samtykti hóskvøldið at taka av tilboðnum frá Føroya Vanlukkutrygging um at hækka eitt lán úr trimum upp í seks mió. krónur.

Eisini varð samtykt at taka lán frá Føroya Lívstrygging til dagstovnin Lítlaskóg. Lánið er 12 mió. krónur við 12 % rentu yvir 15 ár.

Filmsfelagið



Vetrarsól

Í hesum døgum arbeiðir Filmsfelagið við at leggja til rættis norðurlendska filmstevnu »Vetrarsól«. Stevnan verður hildin í Norðurlandahúsinum og Sjónleikarhúsinum í havn í døgunum 23.-28. november 1990.

Sýndir verða nýggir norðurlendskir barna- og vaksnamannafilmir.

Stevnan verður tó sett upp við einum gomlum filmi »Selkvinnan«, sum norðmenn tóku upp her í Føroyum í 1953. Filmurin fer fram um aldaskiftið 1700-1800, tá danskir embætismenn ráddu í landinum. Talsmaður føroyinga mótvegis embætismonnunum er Nólsoyar Páll. Henda leiklut hevur svenski »stórsjarmørurin« Lauritz Falk. Filmurin byggir, sum navnið bendir á, eisini á søgnina um Kópakonuna. Nakrir føroyingar hava eisini verið uppii, tá filmurin varð gjørdur í 1953. Málsligur ráðgevi var Mortan Nolsøe; leiklutin sum »Sverre fangstmann« hevði Benadikt Davidsen úr Mykinesi og Páll Patursson skipaði dansinum.

Stjórin á norska filmstovninum, Jan Erik Holst, fer friggjakvøldið 23. november at greiða frá um filmin og hvussu hann bleiv til.

Leygardagin 24. november verða tveir stytri føroyskir filmar sýndir í Sjónleikarhúsinum. Annar er um Steffan Danielsen, listamálara, og hin er um 5 trolmenn, ið gera klárt at fara. Fyrri filmurin er stjórnaður av Knud Leif Thomsen og hin seinni av Ole Roos. Báðir eru tiknir fyrst í sekstiárunum.

Millum nýggju norðurlendsku filmarnar, sýndir verða, eru 3 barnafilmar; tveir úr Danmark — »Tarzan mama mia« og »Latið isbjarnirnar dansa«. Hesin seinni er í uppskoti at fáa Oscarvirðislønina komandi. Triði barnafilmurin er úr Íslandi og nevnist »Pappirs Pesi«.

Millum vaksnamannafilmarnar eru svenski »Verndareingilin« og teir báðir norsku »Upp í lógvan av tí« og »Landastrok«, sum byggir á søgu Knut Hamsuns. Úr Finnlandi koma teir báðir »Rapsy & Dolly« og »The Undressing«.

Eisini verða stuttfilmir sýndir sum forfilmar.

Umframt filmstevnu, hevur Filmsfelagið vanligu skránna gangandi. Eftir henni er næsta sýning felagsins dagin eftir valið — hin 18. november. Tá sýnir felagið »Gone with the wind«!

Øll kunnu gerast limir í Filmsfelagnum, sum hevur til endamáls at økja um áhugan fyri filmi sum listagrein við at sýna filmar, ið mettir verða at hava listaligt virði.